## Fleiri enn 2 milliónir síður

Fleiri og fleiri fólk vitja portalin. Í síðsta viku setti portalurin nýtt met, tá hann hevði næstan tvær milliónir sýndar síður. Hesa vikuna vísir vevmátingarlistin, sum Gallup Føroyar umsitur, at portalurin enn einaferð hevur sett nýtt met, og fyri fyrstu ferð hevur hann fleiri enn tvær milliónir sýndar síður. Á øðrum plássi á listanum er sportal.fo, meðan planet.fo er nummar trý. Av øðrum miðlum eru uf.fo, dimma.fo, vikublad.fo og nordlysið.fo at finna millum tíggju tey fremstu.




## Terji á Jóansøkufestivalin

Nú eru vit komin inn í Jóansøkuvikuna, og festivalurin í Suðuroynni, Jóansøkufestivalurin, nærkast. Í gjáramorgunin kunngjørdi Jóansøkufestivalurin so enn eitt navn, sum skal taka lut á festivalinum. Talan er um Terja Rasmussen, sum fer á pall sum solistur. Terji telist millum størstu tónleikanøvn í Føroyum síðstu nógvu árini, og hann verður mettur at vera ein av bestu entertainarum innan tónleik í Føroyum, tá umrædur live-framførslur.

# Kunnu læra nógv av útnorðursamstarvi

**Samstarvið í Útnorðurráðnum og Hoyvíkarsáttmálin brynjar okkum til at taka støðu til bæði EFTA og ES spurningin, heldur Poul Michelsen, løgtingsmaður**

ÚTNORÐUR

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í seinastu viku hevði Útnorðurráðið evnisfund í Húsavík í Íslandi, har evnið var Útnorður í globaliseraða heiminum.

Poul Michelsen, sum umboðar løgtingið í útnorðurráðnum, sigur, at nógv varð tosað um handilssáttmálar, um EFTA, Evropasamveldið o. s. fr.

- Tað var ein góð ráðstevna, har nógv góð hugskot komu fram. Vit tosaðu nógv um Hoyvíkarsáttmálan, og grønlendingar gjørdu eisini greitt, at teir ikki vóru so áhugaðir í Hoyvíkarsáttmálanum, sigur Poul Michelsen.

Poul Michelsen vísir á, at meðan føroyingar og íslendingar fara ein veg vinnuliga og handilsliga, so draga grønlendingar annan veg. Teir eru ikki so áhugaðir í Hoyvíkarsáttmálanum, og teir siga beinleiðis, at teir vilja ikki gera vegin kláran hjá íslendingum at keypa Grønland, sum teir taka til.

Grønlendingarnir avvístu kategoriskt at verða við í Hoyvíkarsáttmálanum.

Umboð fyri EFTA vóru eisini við á fundinum, og teir greiddu frá, hvørjar møguleikar útnorðurlondini hava at taka luta í EFTA-samstarvinum.

- Tað var rættiliga týðuligt, at okkara statsrættarligu viðurskifti ikki eru ein forðing fyri limaskapi í EFTA, sigur Poul Michelsen.

Ole Stavad, formaður í Norðurlandaráðnum var eisini við, eins og russisk og norðurnorsk umboð eisini vóru við.

- Eingin veit, hvørjir møguleikar eru við Hoyvíkarsáttmálanum. Vit skulu mugu bara gera okkum greitt, at vit á handilsliga økinum eru aftan fyri íslendingar, men við hesum sáttmálanum, so eri eg sannførdur um, at vit fara at mennast handilsliga og vinnuliga, sigur Poul Michelsen.

Honum dámar ikki kuvøsupolitikk, sum hann tekur til og vísir á grønlendsku støðuna, har tey ikki vilja luttaka í hesum samstarvi av ótta fyri at verða við undirlutan.



*Føroysk umboð, sum vóru á útnorðurfundi í Húsavík í Íslandi í síðstu viku. Tey nýttu eisini høvi at støkka inn á gólvið í Altinginum, sum hevði sín seinasta fund fyri summarsteðgin. Á myndini síggjast Atli Leo, ráðgevi, Árni Johnsen, alþingismaður, Poul Michelsen, løgtingsmaður, Siv Friðleifsdóttir, alþingiskvinna, Geir H. Haarde, forsætisráðharri, Magni Laksáfoss, fíggjarmálaráðharri, Høgni Höydal, løgtingsmaður og Marius Rein, skrivari hjá løgtinginum*

- At byrgja okkum inni kemur ongantíð at bjarga okkum, men hinvegin fara vit at vaksa við uppgávuni, heldur Poul Michelsen, sum sær nógv perspektiv í Hoyvíkarsáttmálanum og í útnorðursamstarvinum sum heild.

- Vit kunnu ikki gerast limir í ES. Vit eru ikki limir í EFTA. So er spurningurin, hvat vit so kunnu gera. Íslandssáttmálin er tí ein møguleiki, sum vit eiga at troyta, vísir hann á.

Poul Michelsen heldur eisini, at samstarvið við Ísland fer at menna okkum til betur at duga at taka støðu til bæði EFTA og ES-spurningin.

Kjakið um ES fyllir annars nógv í íslendskum politikki. Javnaðarflokkurin, sum júst hevur skipað stjórn saman við stóra Sjálvstæðisflokkinum er fyri ES-limaskapi. Hóast Sjálvstæðisflokkurin er ímóti, so hoyrast alsamt fleiri yngri røddir í flokkinum tosa fyri ES-limaskapi, vísir Poul Michelsen á.

Poul Michelsen letur annars væl at ráðstevnuni og arbeiðinum í Útnorðurráðnum sum heild. Hann sigur, at arbeiðið er nógv broytt síðstu árini. Fyrstu árini var arbeiðið meira ein viðfáningur og hevði heldur sosialan týdning. Nú verður størri dentur lagdur í arbeiðið, sum heilt víst hevur ótrúlig perspektiv, sigur Poul Michelsen.



# Óttast uppkaup íslenskra kaupahéðna

**Grænlensk stjórnvöld eru hikandi við að taka þátt í fríverslunarsamningi Íslendinga og Færeyinga. Fyrirtæki og verkalýðsfélög á móti samningum. Óttast fjársterk íslensk fyrirtæki og innflutning erlends vinnuafls til Grænlands.**

**UTANRÍKISMÁL** Grænlensk stjórnvöld óttast afleiðingar fríverslunarsamnings við Ísland og Færeyjar og vilja því ekki taka þátt í Hoyvíkur-samningnum í bili. Samningurinn auðveldar meðal annars fyrirtækjum að fjárfesta í aðildarlöndunum.

Rætt var um fríverslunarsamninginn á fundi Vestnorræna ráðsins á Húsavík á laugardag, og hvöttu bæði íslenskir og færeyskir fulltrúar Grænlendinga til að taka þátt í samningunum.

Aleqa Hammond, utanríkisráðherra Grænlands, segir grænlensk stjórnvöld hafa miklar efasemdir um að Grænlendingar séu tilbúnir til að verða aðilar að fríverslunarsamningnum.

„Ríkisstjórnin hefur rætt við aðila í grænlenska atvinnulífinu, ekki aðeins fulltrúa fyrirtækja og frumkvöðla, heldur einnig verka-

**FRÍVERSLUN** Aleqa Hammond, utanríkisráðherra Grænlands, segir grænlenskt viðskiptalíf ekki nægilega þróað til þess að óhætt sé að taka þátt í fríverslunarsamningi FRÉTTABLAÐIÐ/VAL

samningnum," segir Hammond. „Meginrökin fyrir þessu er sá

uppkaupum fjársterkra íslenskr eða færeyskra aðila á Grænlandi. Auk þess sé Grænland ekki tilbúi

*Íslendska Frettablaðið skrivar í morgun um grønlendskustøðu um Hoyvíkarsáttmálan - og um óttan hjá grønlendingum fyri, at íslendskir spekulantar skulu keypa Grønland*

## FAKTA

### Útnorðurráðið

Arbeiði Ráðsins verður fyriskipað og leitt av formansskapinum, sum er ráðsformaðurin og ein limur úr hvørjari av hinum báðum sendinevndunum.

Formansskapur Útnorðurráðsins aug. 2006 til aug. 2007

Jonathan Motzfeldt (Siumut)
Ráðsformaður

Halldór Blöndal(Sjálfstæðisflokkur)
Fyrsti næstformaður

Henrik Old (Javnaðarflokkurin)
Annar næstformaður

Føroyska sendinevndin í Útnorðurráðnum verður vald av Føroya løgtingi.

Henrik Old (Javnaðarflokkurin)
Formaður
Alfred Olsen (Sambandsflokkurin)
Poul Michelsen (Fólkaflokkurin)
Kári P. Højgaard (Sjálvstýrisflokkurin)
Høgni Hoydal (Tjóðveldisflokkurin)
Jenis av Rana (Miðflokkurin)